# Hava funnið vinnararnar

Nú 2010 er ár fyri lívfrøðiligt fjølbroytni, hava Lívfrøðingafelagið og Miðlahúsið skipað fyri myndakapping og eini skúlakapping við endamálinum at lýsa lívfrøðiligt fjølbroytni í føroysku náttúruni.

Nógvar myndir, tekningar, kollasjur og frágreiðingar komu inn og seinnapartin fríggjadagin fekk Annika Olsen, landsstýriskvinna í innlendismálum, heiðurin at handa vinnarunum virðislønirnar fyri avrikið.

Í skúlakappingini var tað 2. flokkur á Strondum, sum vann kappingina fyri tey yngstu skúlabørnini í 1.-3. Flokki. 5. A á Tvøroyri vann kappingina fyri miðdeildina í skúlanum, sum fevndi um 4. og 5. Flokk, og 7. flokkur á Toftum vann kappingina fyri tey eldru skúlabørnini, ið var fyri børn í 6. og 7. flokki.

Í myndakappingini fekk Helgi Winther Olsen fyrstu virðisløn, sum var eitt myndatól, Hanus Bergsson vann 2. virðisløn, sum var eitt myndatól, sum Expert hevði latið og triðja virðisløn var ein eksternur harðdiskur frá City, umframt 1500 krónur.

Í Sosialinum mikudagin hava vit eina myndarøð á tveimum síðum frá tiltakinum, tá ið vinnararnir vórðu funnir.



*Er hópur av børnum og nógv vaksin vóru til staðar í Miðlahúsinum fríggjadagin, tá ið Annika Olsen, landsstýriskvinna í umhvørvismálum, avdúkaði vinnararnar*

*Myndina tók Jensk Kr. Vang*

**Handilslærlingur**

**Vit sóknast eftir lærlingi til HVS deildina hjá P/F Mariu Poulsen, Smyrilsvegur 8**

**Vit kunnu bjóða:**
Eitt spennandi starv, við dagligum avbjóðingum og góðum arbeiðsumhvørvi.

**Førleikakrøv:**
FHS ella HH er ein treyt fyri at byrja sum lærlingur í handilsvinnuni.

**Vit vænta at tú ert:**
Røsk/raskur, fyrikomandi og von/vanur við at fáast við fólk. Harafturat er tað ein fyrimunur um tú hevur aðrar royndir ella útbúgvingar innan handilsvinnuna, men hettar er eingin treyt.

Seinasta freist at senda umsókn við prógvum er 31. oktober 2010.

Eru spurningar, eru tygum altíð vælkomin at ringja á tel 31 20 00 – Símun Askham.

**pf Maria Poulsen**

Box 182 · FO-110 Tórshavn

## Andlát

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra mamma og omma okkara

**Juline Sofie Joensen**
**fødd Weihe, Skála**
**vanliga nevnd Lina**

andaðist fríggjadagin 22. oktober, 89 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr Skála kirkju mikudagin 27. oktober kl. 14.

*Fyri tey avvarðandi*
**Magnus, Høgni, Jóan Jákup og Ingi**

**Vit vitja við Gjógv**

Í **Oyggjablaðnum** mikudagin seta vit fokus á norðastu bygdina á Eysturoynni. Í hesum blaðnum kanst tú millum annað lesa hetta:

- **Sammy úr Kina: – Eg stórtrívist við Gjógv**



- **Gjáargarður hevur bíleggingar bæði í 2011 og 2012**



- **Nýggjur býlingur við 16 húsum sprettur fram í summar**



- **1,6 mió rogn á smoltstøðini**



- **Ein tunnil MÁ koma**



Oyggjablaðið verður í sølubúðunum mikudagin.